


**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy.
Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
**telefon 22 08 49**

## HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN

*SERSTOVNADEILDIN*

# Avloysari til Verkstaðin á Brekku

Eitt starv sum avloysari fyri verkstaðassistent 20 tímar um vikuna í tíðarskeiðnum 15. august 2006 til 31. juli 2007 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðirnar eru dagtímar mánadag til fríggjadag.

Verkstaðurin á Brekku er eitt vart verkstað, við fleiri framleiðsludeildum. Farloyvisstarvið er á seymi- og ítrivsdeildini.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum handverkari, handarbeiðslærari
- Hevur evnir og hug at arbeiða við fólki ið hava serligan tørv
- Dugir at leggja arbeiðsuppgávur til rættis, eftir førimuninum hjá brúkarunum
- Er opin fyri at luttaka í skeiðum/fundarvirksemi ið mennir stovnin
- Hevur góð samstarvsevnir
- Kann arbeiða sjálvstøðugt

Verstaðurin er normeraður til 17 brúkarar fulla tíð.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, og lønt stigini 11-18.

Nærri fæst at vita um starvið frá leiðaranum á tlf. 456976.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til:

Verkstaðin á Brekku
á Brekku 31
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist: 19. juli kl. 12.00**



# Leys størv

### Køksfólk til Frítíðarskúlan í Hoyvík

Søkt verður eftir køksfólki, at arbeiða 20 tímar um vikuna, at byrja 7. august 2006, ella eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreist: Mánadagin 10. juli 2006.

Setanarviðurskifti : Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Levi Mørk, stovnsleiðara, tlf. 210126 ella 585739.

### Pedagogar til Býlingshúsið á Norðasta Horni

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu, at arbeiða 35 tímar um vikuna, at byrja 14. august 2006, ella eftir nærri avtalu, og eisini eftir einum pedagogi til vøggustovu, at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 14. august 2006, ella eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreist: Mánadagin 24. juli 2006.

Setunarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, tlf. 210906.

**Les meira á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ

## Fráboðan um loyvi til Statoil Færøyene

Við hesum verður sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hin 4. juli 2006 við heimild í kunngerð nr. 37 frá 8. mars 2001 *um nýtslu og burturbeining av evnum og tilfari frá havstøðum*, hevur givið

**Loyvi til nýtslu og burturbeining av evnum og tilfari til Statoil Færøyene, leitiboring 6104/21-1, brugdan**

Loyvið liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni og kann eisini síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

W W W . S O S I A L U R I N . F O

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara til at byrja 15. august 2006.

Lønin er sambært sáttmálan millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Arbeiðarafelag.

Umsóknin skal vera kommununi í hendi innan 1. august 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri Dagstovnin á tlf. 421660 ella 214360.

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4
FO-340 Kvívík

# KOYRIKORT

Komandi mánadag, tann 10. juli

Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 10. juli
Avmarkað luttøka, so ber skjótt at!
Tilmelding á tlf. 22 24 70 ella 318779

KOYRISKÚLIN V/ÁRNA ANDREASEN
TÓRSHAVN · TLF. 318779 / 222470

**LØGTINGIÐ**

# Løgtingið

Umsiting Løgtingsins er stongd vegna summarfrí frá mánadegnum 10. juli til leygardagin 22. juli 2006.

Um okkurt átrokandi er, kann ringjast til: **211785** ella **311785.**

Løgtingið, tann 30. juni 2006

**Súsanna Danielsen, stjóri**